FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 29. juni 2021
J. nr.:

Svar uppá fyrispurning nr. 52-168/2020 frá Beintu Løwe Jacobsen, løgtingskvinnu, settur, Jørgeni Niclasen, landsstýrismanni í fíggjarmálum, um umstøðurnar hjá ferðafólki í Kalsoynni.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvørjar ætlanir eru um at betra umstøðurnar hjá ferðafólki á ferjuleguni í Syðradali, so hesi hava eitt skýli ella líknandi at bíða í?
2. Um ongar ítøkiligar ætlanir eru, ætlar landsstýrismaðurin sær so at arbeiða fyri, at eitt skýli ella annað kemur, so ferðafólk kunnu fara inn at kroka?

Svar:
Landsverk upplýsir, at arbeitt hevur verið við at betra um umstøðurnar hjá ferðafólki við ferjuleguna á Syðradali. Ymiskar loysnir hava verið viðgjørdar, og nakað av útreiðslum eru brúktar til planlegging og tekning. Niðurstøðan hjá Landsverk er, at loysnirnar sum arbeitt hevur verið við, eru ov langt frá upprunaligu ætlanini. Skýlið gjørdist ov stórt og við ov nógvum funktiónum. Tí er arbeiðið steðgað og málið endurskoðað.

Tinganes, 29. mai 2021

Jørgen Niclasen
Landsstýrismaður í fíggjarmálum